FISKIRANNSÓKNARSTOVAN

# STOVNSMETINGAR 1990

Lagt til rættis: *Andras Kristiansen*

FRS Smárit nr. 90/2

## 1. INNGANGUR

Stovnsmetingarnar av fiskastovnunum undir Føroyum og tilmæli um hóskandi veiðutrýst verða gjørd av Altjóða Ráðnum fyri Havrannsóknir (á enskum stytt til ICES). Hetta arbeiðið fer fram í tveimum. Sjálvar stovnsmetingarnar verða gjørdar av einum arbeiðsbólki, sum umframt at arbeiða við toski, hýsu og upsa undir Føroyum, eisini viðger upsa undir Íslandi og kongafisk, svartkalva, blálongu, longu og brosmu undir Føroyum, Íslandi og Eysturgrønlandi. Eisini viðger bólkurin kongafiskin í Irmingerhavinum. Frágreiðingin hjá arbeiðsbólkinum verður latin tí ráðgevandi nevndini hjá ICES, sum á enskum er stytt til ACFM (Advisory Committee on Fishery Management). Henda nevndin hevur tveir fundir um árið. Tilmælini frá hesi nevndini eru tey endaligu frá ICES, tá tað snýr seg um røkt av fiskastovnum.

Á fundi í arbeiðsbólkinum eru fiskifrøðingar úr flestu av teimum londum, sum fiska av einum ella fleiri stovnum, ið bólkurin viðger. Í tí ráðgevandi nevndini situr eitt umboð fyri hvørt limaland í ICES umframt einar 3-4 formenn í ávísum nevndum undir ICES. Umrøddi arbeiðsbólkurin hevði fund í Keypmannahavn í døgunum frá 1. til 8 mei í ár og eina viku seinni hevði tann ráðgevandi nevndin sín fund. Á fundi í arbeiðsbólkinum vóru úr Føroyum Kjartan Hoydal, sum er formaður, Andras Kristiansen og Jákup Reinert. Hjalti í Jákupsstovu var á fundi í tí ráðgevandi nevndini.

Í hesum ritinum verður greitt frá úrslitunum av stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa undir Føroyum, umframt tilmælunum frá ACFM. Eisini er ein samandráttur av tí, sum arbeiðsbólkurin og ACFM høvdu at siga um hinar fiskastovnarnar, ið arbeiðsbólkurin eisini viðgjørdi.

## 2. HUGTØK OG FORTREYTIR

Áðrenn farið verður til stovnsmetingarnar, skal í stuttum verða greitt frá hugtøkum og fortreytum, sum koma fyri fleiri ferðir.

*Fiskideyðatalið* er tann parturin, sum fiskiskapurin støðugt minkar um ein fiskastovn. Hetta verður roknað fyri hvønn aldur hvørt ár. Eitt miðal fyri fleiri aldrar verður vanliga undir einum rópt *veiðutrýst*. Grundarlagið undir útrokningunum av fiskdeyðatalinum er veiðan í tali eftir aldri umframt aðrir upplýsingar sum t. d. úrslit frá yvirlitstrolingunum.

Í samband við stovnsmetingarnar verða *forsagnir* gjørdar um veiðunøgdir og stovnsstødd komandi árini við ymiskum veiðutrýstum. Grundarlagið undir hesum útrokningunum er umframt veiðutrýstið tal av fiski í stovninum eftir aldri, tilgongd av ungum fiski og hvussu nógv fiskurin vigar eftir aldri. Roknihátturin, sum verður brúktur í stovnsmetingunum, gevur ikki nóg álítandi úrslit fyri aldursbólkarnar, sum ikki hevur verið fiskað av í eini 2 ár. Úrslitini fyri teir yngstu árgangirnar eru tí nakað óviss, og í forsøgnunum verða heldur miðal árgangir brúktir, um ikki aðrir upplýsingar eru tøkir. Forsagnirnar verða gjørdar fyri eini tvey til trý ár fram; eisini hesi árini verður roknað við miðal árgangum. Tað er sostatt greittt, at um fiskurin verður veiddur lutfallsliga ungur, kann metingin, sum verður gjørd um tilgongdina tey síðstu 2-3 árini og tey komandi, hava munandi ávirkan á forsagnirnar. Hetta eigur at verða havt í huganum, tá mett verður um úrslitini.

Forsagnir verða gjørdar við ymiskum veiðutrýstum; hetta verður gjørt fyri at vísa, hvussu veiðutrýstið ávirkar stovn og veiðu. Tó eigur at verða havt í huganum, at hetta eru stutttíðar útrokningar, so langtíðar avleiðingarnar av broytingum í veiðutrýstinum síggjast ikki. Fyri tað fyrsta árið (t.v.s. 1990) verður roknað við, at trýstið er tað sama sum í 1989.

Veiðutrýstini, sum roknað verður við í 1990 og 1991, eru hesi : 1) tað sama sum í 1989, 2) 20 % minni enn í 1989, 3) 20 % størri enn í 1989, 4) $F_{max}$, t. v. s. tað veiðutrýstið sum í eini langtíðar meting gevur størst veiðu og 5) $F_{0.1}$, sum er tað veiðutrýstið, ið fiskifrøðingar meta verða best hóskandi; $F_{0.1}$ er nakað minni enn $F_{max}$, men munurin í langtíðarveiðuni er vanliga lítil.

## 3. TOSKUR

### *Veiða*

Veiðan av toski undir Føroyum verður gjørd upp fyri landgrunnin og Føroya Banka fyri seg, (talvurnar 1 og 2 og myndirnar 1 og 2). Á landgrunninum vórðu av toski í 1989 fiskað um 23.400 tons, sum er á leið tað sama sum í 1987 og 1988, men um 15.000 tons færri enn í 1985, ið var eitt metár. Árini 1975 til 1987 vórðu í miðal fiskað um 2.300 tons á Føroya Banka hvørt árið, men í 1988 minkaði veiðan niður í um 1.400 tons og í 1989 niður í einans 460 tons. Føroysk skip fiskaðu meir enn 98 % av toskinum undir Føroyum. Hvussu nógv teir ymisku skipabólkarnir fiskaðu í 1989, er víst á mynd 3.

Veiðan í tali hvørt ár síðstu 10 árini, býtt sundur eftir aldri, er víst í talvu 3. Í 1989 var um helvtin av talinum 2 og 3 ára gamal toskur. Lutfallsliga varð nógv fiskað av 2 ára gomlum; tað vóru serliga útróðrarbátarnir, sum veiddu henda fiskin.

### *Fiskideyðatalið*

Tey roknaðu fiskideyðatølini fyri toskastovnin á landgrunninum aftur til 1980 eru víst í talvu 4. Í miðal var fiskideyðatalið fyri 3 til 7 ára gamlan tosk í 1989 0.69, sum er væl hægri enn árini frammanundan. Hetta svarar til, at um 50 % av talinum í stovninum verður fiskað um árið. Miðalfiskideyðatalið aftur til 1962 er víst á mynd 4.

### *Stovnurin*

Tann útroknaða stovnsstøddin 1. januar hvørt ár aftur til 1980 er víst í talvu 5. Har síggjast bæði tal í stovninum fyri hvønn aldur og hvussu stórur gýtingarstovnurin (t.v.s.fiskur 4 ár og eldri) í vekt hevur verið. Gýtingarstovninum og tilgongdin av ársgomlum toski aftur til 1962 eru víst á mynd 5. Gýtingarstovnurin er minkaður hvørt ár síðan 1986, og er nú sera lítil, einans um 29.000 tons. Sum stovnsmetingarnar síðstu árini hava víst, vísir henda metingin eisini, at tað var ein sera stórur árgangur, sum kom undan í 1982, og at árgangurin frá 1983 var ein miðalárgangur. Stovnsmetingin staðfestir, at bæði 1984 og 1985-árgangirnir ikki eru meir enn umleið helvtina av einum miðal árgangi; tað sama kann sigast um árgangin frá 1986. Árgangurin frá 1987 tykist vera góður. Hesi úrslitini samsvara væl við tað, sum er komið fram við ynguikanningunum og yvirlitstrolingunum síðstu árini. Stovnsmetingin sigur einki um 1988-árgangin, men yvirlitstrolingarnar í ár góvu ikki nakra ábending um góðan ella miðal árgang, heldur hinvegin.

### *Veiðuútlit*

Tølini, sum forsagnirnar fyri tosk á landgrunninum eru grundaðar á, eru víst í talvu 6. Úrslitini frá stovnsmetingunum eru brúkt fyri árgangirnar frá 1986 og eldri. Metingin av 1987-árganginum er grundað á úrslitini frá yvirlitstrolingunum; sambært teimum er hann nakað minni enn tað, sum stovnsmetingin vísti, men tó framvegis væl oman fyri miðalstødd. Fyri teir yngru árgangirnar, t.v.s. frá 1988 og yngri, er miðal tilgongd brúkt. Hetta talið er 22 milliónir ársgamlir toskar. Miðalvektin upp á aldur er sett at verða miðal fyri árini 1987-1989. Fiskimynstrið, sum stendur í talvuni, er tað, sum stovnsmetingin kom fram til fyri 1989.

Úrslitini frá forsøgnunum eru víst í talvu 7. Verður hildið fram við sama veiðutrýsti sum í 1989, verða í 1990 fiskað 25.000 tons og í 1991 26.000 tons. Gýtingarstovnurin varð mettur at vera einans 29.000 tons 1. januar 1990; verður hildið fram við verandi veiðutrýsti, veksur hann nakað, men verður tó framvegis lítil. Hækkingin kemur av, at í stovninum eru lutfallsliga

smáir árgangir frá 1984, 1985 og 1986; í 1991 gerst 1987 árgangurin, sum er oman fyri miðalstødd, kynsbúgvin og í 1992 miðalárgangurin frá 1988. Verður tilgongin eftir 1987 undir miðal veksur gýtingarstovnurin ikki so nógv, sum útrokningarnar vísa, umframt at veiðan verður minni. Verður veiðutrýstið í 1991 sett til $F_{max}$ ella $F_{0.1}$, sum bæði eru væl minni enn verandi veiðutrýst, verður veiðan munandi minni, men stovnurin verður størri.

Í niðurstøðu síni kemur ACFM (tað er tann ráðgevandi nevndin hjá ICES viðvíkjandi fiskastovnum) til, at veiðutrýstið komandi árini eigur at verða minkað munandi, í hvussu so er niður á $F_{max}$. Hetta svarar til 45 % minni roynd. Um veiðutrýstið skal koma niður á $F_{max}$ í 1991, skulu ikki meir enn 16.000 tons av toski verða fiskað á landgrunninum í 1991.

Arbeiðsbólkurin og ACFM umrøddu eisini toskastovnin á Føroya Banka. Tilfar er ikki tøkt at grunda stovnsmetingar á, men ongin ivi tykist kortini vera um, at stovnurin er sera illa fyri, verður sagt. Hetta er grundað á ta stóru minkingina í veiðuni síðstu árini. Mælt verður til at friða toskastovnin á Føroya Banka munandi, so hann fær møguleikar at koma fyri seg aftur.

## 4. HÝSA

### *Veiða*

Eins og fyri tosk verður hýsuveiðan undir Føroyum gjørd upp fyri landgrunnin og Føroya Banka fyri seg; nøgdirnar, sum hvørt land hevur fiskað aftur til 1980, síggjast í talvunum 8 og 9, og myndirnar 6 og 7 vísa ta samlaðu veiðuna aftur til 1962. Í 1989 vórðu veidd um 15.000 tons; tað eru 3.000 tons fleiri enn árið fyri, men um 10.000 tons færri enn í 1977, sum var metár. Í tíðarskeiðnum frá 1980 fram til 1987 vórðu millum 900 og 1600 tons av hýsu fiskað á Føroya Banka, men síðstu tvey árini er veiðan minkað munandi; í 1989 vórðu einans um 200 tons fiskað. Útlendsk skip veiddu 150 tons av hýsu undir Føroyum í 1989. Á mynd 8 sæst, hvussu nógv teir ymisku skipabólkarnir fiskaðu av hýsu á landgrunninum í 1989.

Veiðan í tali fyri hvørt ár tey síðstu 10 árini, býtt sundur eftir aldri, er víst í talvu 10. Í 1989 var meginparturin av veiðuni millum 5 og 7 ára gomul hýsa. Stovnsmetingin av hýsu verður gjørd fyri hýsuna á landgrunninum og á Føroya Banka undir einum.

### *Fiskideyðatalið*

Tey roknaðu fiskideyðatølini fyri hýsustovnin síggjast í talvu 11 og á mynd 9. Miðal veiðutrýstið verður roknað fyri aldrarnar 4 til 8 ár. Stovnsmetingin vísir, at veiðutrýstið gjørdist nakað størri í 1989 enn í 1988, men tó á leið á sama støði sum tey síðstu 10 árini annars. Veiðutrýstið svarar til, at um 23 % av talinum í stovninum verður fiskað árliga.

### *Stovnurin*

Stovnurin í tali eftir aldri og gýtingarstovnurin í vekt hvønn 1. januar í tíðarskeiðnum 1980 til 1990 eru víst í talvu 12; til gýtingarstovnin roknað vit hýsu, sum er 3 ár ella eldri. Gýtingarstovnurin og tilgongdin av ársgamlari hýsu aftur til 1962 eru víst á mynd 10. Tilgongdin til hýsustovnin árini 1977 til 1987 hevur verið munandi minni enn miðal; tó var 1982-árgangurin góður, umleið tað dupulta av miðaltilgongdini. Tann vánaliga tilgongdin er orsøkin til tær lágu heildarlandingarnar av hýsu síðstu árini. Stovnsmetingin gevur ongar ábendingar um, at nakar góður árgangur er á veg. Tó tykist árgangurin frá 1986 at verða hampiligur, tó munandi undir langtíðarmiðalinum, men tann frá 1987 tykist at vera lítil. Orsakað av tí vánaligu tilgongdini 1977-1979 minkaði gýtingarstovnurin niður í umleið 55.000 tons í 1982, men tá tann góði 1982-árgangurin gjørdist kynsbúgvin í 1985, vaks gýtingarstovnurin aftur fram til 1987; síðani er hann minkaður aftur og er eftir hesi

stovnsmetingini komin niður á um 53.000 tons 1. januar 1990.

*Veiðuútlit*

Talgrundarlagið undir forsøgnunum av hýsuveiðuni í ár og komandi ár er víst í talvu 13. Úrslitini frá stovnsmetingunum eru brúkt fyri árgangirnar frá 1987 og eldri; fyri árgangirnar síðani 1988 er miðal tilgongd fyri tíðarskeiðið 1977-1984 brúkt; tað eru 22 milliónir ársgamlar hýsur. Vektin fyri hvønn aldur er miðal fyri árini 1987 til 1989.

Forsagnirnar eru vístar í talvu 14. Um hildið verður fram við sama veiðutrýstið í ár og næsta ár sum í 1989, verða 12.000 tons fiskað í ár og 11.000 tons komandi ár. Hetta eru 2-3.000 tons færri enn í 1989. Gýtingarstovnurin verður framvegis á sama lága støði.

Tilmælið hjá ACFM viðvíkjandi hýsustovninum undir Føroyum er, at hildið kann verða fram við verandi veiðutrýsti; hetta svarar til eina veiðu í 1990 upp á 12.000 tons og í 1991 upp á 11.000 tons. Um hýsuna á Føroya Banka verður sagt, at hon eins og toskurin har er sera illa fyri og tí eisini eigur at verða munandi friðað.

## 5. UPSI

*Veiða*

Upsaveiðan undir Føroyum aftur til 1980 er víst í talvu 15 og aftur til 1962 á mynd 11. Veiðunøgdirnar hava verið skiftandi; í fyrru helvt av sjeytiárunum varð nógv fiskað, men so minkaði veiðan fram til 1980. Eftir tað fóru nøgdirnar aftur at økjast og 1984 var nýtt metár. Síðani hava árliga verið fiskað millum 40.000 og 45.000 tons um árið, hóast royndin hevur verið munandi størri enn árini frammanundan. Føroyingar fóru ikki at fiska upsa av álvara fyrr enn í 1978; í 1989 fiskaðu føroysk skip meir enn 99 % av tí samlaðu nøgdini.

Í talvu 16 er veiðan í tali fyri hvønn aldur aftur til 1980 víst. Samansetingin av veiðuni er nógv broytt; í 1980 og 1981 var talið av eldri upsa í veiðuni væl størri enn tey síðstu árini, hóast veiðan nú er munandi størri. Í 1989 svaraði talið av 4-6 ára gomulum til 90 % av tí samlaða fiskaða talinum; í vekt svaraði tað til 84 %. Veiðan av upsa býtt eftir skipabólkum er víst á mynd 12.

*Fiskideyðatalið*

Tey roknaðu fiskideyðatølini fyri upsastovnin undir Føroyum eru víst í talvu 17; sum tað sæst, hevur veiðutrýstið verið støðugt hækkandi alt hetta tíðarskeiðið. Veiðutrýstið í 1989 svarar til, at um 45 % av tí samlaða talinum í stovninum verður fiskað árliga. Miðalfiski-deyðatalið aftur til 1962 er víst á mynd 13.

*Stovnurin*

Upsastovnurin í tali og gýtingarstovnurin í vekt 1. januar hvørt ár aftur til 1980 síggjast í talvu 18; til gýtingarstovnin rokna vit upsa, sum er 5 ár ella eldri. Gýtingarstovnurin aftur til 1962 er eisini vístur á mynd 14. Sum tað sæst, er hann eftir 1975 støðugt minkaður; í fjør var hann komin niður á um 77.000 tons, sum er eitt tað minsta, hann nakrantíð hevur verið. Henda støðuga minkingin er farin fram, hóast tilgongdin til stovnin hevur verið lutfalsliga góð; fleiri sera góðir árgangir eru komnir undan, t. d. í 1978, 1980 og 1983. Minkingin stendst av, at síðstu árini er nógvur upsi, sum ikki er kynsbúgvin, fiskaður. Ongir neyvir upplýsingar eru um, hvussu tilgongdin hevur verið eftir 1985, men úrslitini benda tó á, at 1986-árgangurin er væl undir miðal.

*Veiðuútlit*
Grundarlagið undir útrokningunum av veiðunøgdum og gýtingarstovni eftir 1989 er víst í talvu 19. Fyri árgangirnar fram til 1985 eru virðini frá stovnsmetingunum brúkt, men fyri teir eftir tað er miðalstødd brúkt; henda er 33 milliónir ársgamlir upsar (seiðir).

Forsagnirnar um upsaveiðuna komandi árini eru vístar í talvu 20. Verður hildið fram við sama veiðutrýsti sum í 1989, verða í 1990 fiskað 39.000 tons og í 1991 35.000 tons. Sostatt eru ábendingar um minni veiðunøgdir komandi árini og minni gýtingarstovn. Ongar útrokningar vórðu gjørdar við veiðitrýsti svarandi til $F_{max}$, men verður tað minkað til $F_{0.1}$, verða í 1991 einans fiskað 12.000 tons, men gýtingarstovnurin gerst nógv størri.

Í niðurstøðu síni sigur ACFM, at veiðutrýstið á upsastovnin undir Føroyum er ov stórt. Mælt verður til at minka tað í hvussu so er við 20 %. Hetta svarar til eina veiðu í 1991 upp á 30.000 tons.

## 6. KONGAFISKUR

Í kongafiskaveiðuni undir Føroyum, Íslandi og Eysturgrønlandi eru tvey ymisk sløg, stóri kongafiskur (á latíni nevndur *Sebasetes marinus*) og trantkongafiskur (á latíni nevndur *Sebastes mentella*). Tann stóri kongafiskurin í hesum trimum økjunum verður hildin at vera ein stovnur fyri seg og somuleiðis trantkongafiskurin. Í Irmingarhavinum verður nógvur trantkongafiskur eisini fiskaður, men hildið verður, at hetta er ein stovnur fyri seg; hesin trant-kongafiskurin heldur seg sum vaksin uppi í sjónum og verður tí nevndur uppsjóartrantkonga-fiskur.

*Stóri kongafiskur*
Nøgdirnar íalt av stóra kongafiski fiskaðar undir Føroyum, Íslandi og Eysturgrønlandi síðstu 10 árini síggjast í talvu 21. Eftir at veiðan í 1982 var komin upp á meir enn 120.000 tons, er hon minkað støðugt; í 1989 vórðu 63.000 tons fiskað. Tað er Ísland, sum veiðir tann størsta partin. Á mynd 15 er veiðan býtt sundur á tey trý økini; sum tað sæst, verður eisini nógv mest fiskað undir Íslandi.

Á fundi í arbeiðsbólkinum varð komið til ta niðurstøðu, at tilfarið, ið var tøkt, ikki var nóg gott grundarlag undir eini veruligari stovnsmeting av stovninum av stóra kongafiski. ACFM kann tí ikki geva beinleiðis ráð um veiðutrýst og veiðunøgdir, men mælt verður tó til, at veiðan ikki fer upp um 77.000 tons; hetta svarar til árligu miðalveiðuna fyri árini 1985 til 1989. Um veiðan skal vera tann sama lutfallsliga millum økini sum í 1989, skulu eftir hesum ikki meir enn 5.000 tons av stóra kongafiski verða veidd undir Føroyum í ár og komandi ár.

*Trantkongafiskur*
Síðstu 10 árini eru undir Føroyum, Íslandi og Eysturgrønlandi tilsamans fiskað millum 27.000 og 58.000 tons av trantkongafiski um árið, tey flestu árini um 45.000 tons, talva 22. Í 1989 vórðu veidd 44.000 tons; av hesum fiskaði Ísland 31.000 tons. Býtið millum veiðuøkini sæst á mynd 16; undir Føroyum hava millum 11.000 og 15.000 tons verið fiskað síðstu 5 árini.

Eins og fyri tann stóra kongafiskin kom arbeiðsbólkurin til ta niðurstøðu, at nóg gott tilfar ikki var tøkt at grunda eina veruliga stovnsmeting av trantkongafiskastovninum á. ACFM hevur tí eisini fyri henda stovnin givið eitt tilmæli um veiðunøgd, sum er grundað á miðalveiðuna fyri tíðarskeiðið 1985 til 1989. Eftir hesum skal veiðan av trantkongafiski ikki fara upp um 44.000 tons tilsamans. Um býtið millum økini skal vera tað sama, sum tað var í 1989, skal veiðan av trantkongafiski undir Føroyum ikki fara upp um 10.500 tons í ár og komandi ár.

*Uppsjóartrantkongafiskur*
Fiskiskapurin eftir trantkongafiski í Irmingerhavinum tók seg upp í 1982, tá sovjettisk skip veiddu um 60.000 tons. Eftir fáum árum vaks veiðan til 105.000 tons, men er síðan minkað; í 1989 vórðu 37.000 tons fiskað, talva 23. Tað eru framvegis sovjettisk skip, sum fiska meginpartin. Í 1988 veiddu føroysk skip um 1.000 tons av hesum kongafiskinum men onki í 1989.

Veruligar stovnsmetingar hava ikki verið gjørdar av hesum stovninum áður, men á fundinum í mei metti arbeiðsbólkurin, at tilfarið, sum nú er tøkt, er gott grundarlag undir eini stovnsmeting. Henda meting vísir, at støddin á gýtingarstovninum ikki er munandi broytt hesi árini, fiskað hevur verið. Veiðutrýstið í 1989 var munandi minni enn árini frammanundan. ACFM mælir til ikki at økja um verandi veiðutrýst; hetta svarar til, at í ár skal veiðan ikki fara upp um 54.000 tons og í 1991 ikki upp um 66.000 tons.

## 7. BLÁLONGA, LONGA OG BROSMA

Farið er undir at savna tilfar, sum skal brúkast til stovnsmetingar av blálongu, longu og brosmu. Hetta arbeiðið er tó enn komið so stutt áleiðis, at veruligar stovnsmetingar ikki enn kunna gerast av hesum stovnunum. Økið, sum tilfar verður savnað frá, fevnir um havleiðirnar undir Eysturgrønlandi, Íslandi, Føroyum og vestan fyri Hebridurnar. Tann lívfrøðiliga vitanin um hesi fiskasløgini er lutfallsliga lítil, og ger hetta arbeiðið at fyriskipa stovnsmetingar torførari. Til dømis er ikki greitt, um tað eru ein ella fleiri stovnar av ávikavist blálongu, longu ella brosmu í hesum stóra økinum.

*Blálonga*
Blálonguveiðan undir Føroyum árini 1980-1989 er víst í talvu 24. Hetta tíðarskeiðið hava verið fiskað millum 5.000 og 10.000 tons um ári. Í 1989 minkaði veiðan við 3.600 tonsum sammett við 1988. Nøgdirnar av blálongu fiskaðar í hvørjum av teimum umrøddu økjunum 1980-1989 síggjast á mynd 17. Í 1989 var meir enn helmingurin av tí samlaðu nøgdini fiskað vestan fyri Hebridurnar og undir Føroyum; tað eru fransmenn og føroyingar, sum fiska meginpartin. Hóast ikki ber til at gera stovnsmetingar av blálongustovninum, metir ACFM, at tað er nógv, sum bendir á, at stovnurin verður ov nógv troyttur. Veiða upp á veiðuorku er minkað munandi síðstu árini.

*Longa*
Longuveiðan undir Føroyum er gjørd upp í talvu 25 fyri hvørt land sær aftur til 1980, og á mynd 18 sæst, hvussu nógv hevur verið fiskað av longu í hvørjum av teimum 4 økjunum. Norðmenn og føroyingar fiska meginpartin av longuni undir Føroyum. Norðmenn fiskaðu í 1989 meir enn helvtina og íslendingar ein triðing av tí samlaðu veiðuni í øllum økjunum; tann føroyska veiðan var um eini 10 % av heildarveiðuni. Eins og fyri blálongustovnin metir ACFM, at ov nógv royndd er eftir longu. Hjá norskum línuskipum er veiðan upp á veiðuorku nógv minkað síðstu árini.

*Brosma*
Brosmuveiðan undir Føroyum er gjørd upp í talvu 26 fyri hvørt land sær fyri tíðarskeiðið 1980 fram til 1989, og á mynd 19 er heildarveiðan fyri øll fýra økini býtt sundur á hvørt øki. Sum heild kann sigast, at brosmunøgdirnar í øllum økjunum hava verið støðugar hetta tíðarskeiðið; flestu árini hava um 6.000 tons verið fiskað undir Føroyum. Tó verður mett, at royndin, serliga tann norska, er vaksin nakað síðstu árini; hetta merkir, at veiða upp á veiðuorku er minkað. Tí verður hildið, at royndin eftir brosmu er ivaleysa stór.

**Talva 1. Toskaveiðan á føroyska landgrunninum 1980-1989. Veiða í tonsum.**

| Land/Ár | 1980 | 1981 | 1982 | 1983 | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 19966 | 22616 | 21387 | 37916 | 36914 | 39422 | 34492 | 21303 | 25500 | 23000 |
| Frakland | 40 | 47 | 10 | 13 | 34 | 29 | 4 | 17 | 17 | |
| V.Týskaland | | | | 128 | 9 | 5 | 8 | 12 | 5 | 7 |
| Noreg | 127 | 240 | 90 | 76 | 22 | 28 | 83 | 21 | 163 | 410 |
| Ongland | 13 | | | | | | | 8 | | |
| Skotland | 367 | 60 | 2 | | | | | | | |
| Danmark | | | | | | | 8 | 30 | 10 | |
| Tilsamans | 20513 | 22963 | 21489 | 38133 | 36979 | 39484 | 34595 | 21391 | 25695 | 23417 |

**Talva 2. Toskaveiðan á Føroya Banka 1980-1989. Veiða í tonsum.**

| Land/Ár | 1980 | 1981 | 1982 | 1983 | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 724 | 975 | 2184 | 2284 | 2189 | 2913 | 1836 | 1861 | 1238 | 449 |
| Noreg | 54 | 120 | 16 | 17 | 11 | 23 | 6 | 23 | 94 | |
| Ongland | 85 | | | | | | | | | |
| Skotland | 340 | 134 | 152 | 66 | 16 | 25 | 63 | 47 | 37 | 12 |
| Tilsamans | 1203 | 1229 | 2352 | 2367 | 2216 | 2961 | 1905 | 1931 | 1369 | 461 |

**Talva 3. Toskaveiðan á landgrunninum 1980-1989 eftir aldri. Tal í túsund.**

| Aldur/Ár | 1980 | 1981 | 1982 | 1983 | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 41 | 16 | 5 | 80 | 37 | 0 | 0 | 11 | 0 | 0 |
| 2 | 1129 | 646 | 1139 | 2149 | 4396 | 998 | 210 | 273 | 555 | 2373 |
| 3 | 2263 | 4137 | 1965 | 5771 | 5234 | 9484 | 3586 | 1446 | 2313 | 2282 |
| 4 | 1461 | 1981 | 3073 | 2760 | 3487 | 3795 | 8462 | 2772 | 2120 | 2321 |
| 5 | 895 | 947 | 1286 | 2746 | 1461 | 1669 | 2373 | 3273 | 1618 | 1190 |
| 6 | 807 | 582 | 471 | 1204 | 912 | 770 | 907 | 862 | 2375 | 1089 |
| 7 | 832 | 487 | 314 | 510 | 314 | 872 | 236 | 238 | 536 | 1057 |
| 8 | 339 | 527 | 169 | 157 | 82 | 309 | 147 | 72 | 183 | 233 |
| 9 | 42 | 123 | 254 | 104 | 34 | 65 | 47 | 73 | 36 | 64 |
| 10 | 18 | 55 | 122 | 102 | 66 | 80 | 38 | 28 | 27 | 10 |
| Tilsamans | 7827 | 9501 | 8798 | 15583 | 16023 | 18042 | 16006 | 9048 | 9763 | 10619 |

**Talva 4.** Fiskideyðatølini fyri toskastovnin á landgrunninum 1980-1989

| Aldur/Ár | 1980 | 1981 | 1982 | 1983 | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 |
| 2 | 0.05 | 0.05 | 0.04 | 0.08 | 0.05 | 0.06 | 0.05 | 0.04 | 0.06 | 0.07 |
| 3 | 0.26 | 0.27 | 0.24 | 0.42 | 0.30 | 0.34 | 0.30 | 0.24 | 0.32 | 0.41 |
| 4 | 0.40 | 0.41 | 0.37 | 0.66 | 0.46 | 0.52 | 0.46 | 0.37 | 0.49 | 0.64 |
| 5 | 0.45 | 0.46 | 0.42 | 0.73 | 0.52 | 0.59 | 0.52 | 0.41 | 0.55 | 0.71 |
| 6 | 0.51 | 0.53 | 0.48 | 0.84 | 0.59 | 0.67 | 0.59 | 0.47 | 0.63 | 0.82 |
| 7 | 0.56 | 0.58 | 0.52 | 0.92 | 0.65 | 0.74 | 0.65 | 0.51 | 0.69 | 0.90 |
| 8 | 0.50 | 0.51 | 0.47 | 0.82 | 0.58 | 0.66 | 0.58 | 0.46 | 0.62 | 0.80 |
| 9 | 0.40 | 0.41 | 0.37 | 0.66 | 0.46 | 0.52 | 0.46 | 0.37 | 0.49 | 0.64 |
| 10 | 0.40 | 0.41 | 0.37 | 0.66 | 0.46 | 0.52 | 0.46 | 0.37 | 0.49 | 0.64 |
| F(3-7) | 0.44 | 0.45 | 0.41 | 0.71 | 0.50 | 0.57 | 0.50 | 0.40 | 0.54 | 0.70 |

**Talva 5.** Tal av fiski í toskastovninum 1. januar 1980-1990 eftir aldri og gýtingarstovnurin í tonsum. Tal í túsund.

| Aldur/Ár | 1980 | 1981 | 1982 | 1983 | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 | 1990 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 17318 | 27322 | 31644 | 62664 | 23213 | 11806 | 13250 | 13373 | 44000 | | |
| 2 | 23492 | 14142 | 22354 | 25903 | 51233 | 18972 | 9666 | 11025 | 9815 | 36268 | |
| 3 | 11788 | 18215 | 10995 | 17274 | 19270 | 37982 | 14633 | 8052 | 8780 | 7535 | 27553 |
| 4 | 5180 | 7615 | 11194 | 7234 | 8969 | 11076 | 22575 | 8433 | 5291 | 5111 | 4122 |
| 5 | 2842 | 2929 | 4455 | 6405 | 3451 | 4222 | 5667 | 10049 | 4419 | 2435 | 2111 |
| 6 | 2267 | 1524 | 1549 | 2493 | 2789 | 1519 | 1963 | 2401 | 5293 | 2168 | 932 |
| 7 | 2719 | 1133 | 726 | 845 | 967 | 1466 | 558 | 759 | 1194 | 2211 | 804 |
| 8 | 878 | 1480 | 492 | 314 | 239 | 510 | 425 | 221 | 408 | 499 | 867 |
| 9 | 140 | 415 | 739 | 251 | 117 | 122 | 143 | 217 | 117 | 170 | 200 |
| 10 | 60 | 186 | 355 | 246 | 227 | 151 | 116 | 83 | 88 | 27 | 95 |
| Tilsamans | 66684 | 74961 | 84503 | 123629 | 110475 | 87826 | 68996 | 54613 | 79405 | | |
| G.stovnur | 47286 | 47630 | 56913 | 57525 | 62018 | 60196 | 74918 | 63009 | 49797 | 37831 | 27670 |

**Talva 6.** Talgrundarlagið undir forsøgnunum viðvíkjandi toskastovninum.

| Aldur | Stovnur | F | Miðalvekt |
|---|---|---|---|
| 1 | 22000 | 0.00 | 0.679 |
| 2 | 19000 | 0.07 | 1.055 |
| 3 | 20600 | 0.41 | 1.621 |
| 4 | 4122 | 0.64 | 2.220 |
| 5 | 2111 | 0.71 | 2.871 |
| 6 | 932 | 0.81 | 3.495 |
| 7 | 804 | 0.89 | 4.396 |
| 8 | 867 | 0.80 | 5.306 |
| 9 | 200 | 0.64 | 7.245 |
| 10 | 95 | 0.64 | 9.085 |

Tilgongd 1990 : 22000
1991 : 22000

Tal í stovni pr. 1/1-1990.
Tal uppgivið í túsund.
Miðalvekt uppgivin í kg.

**Talva 7.** Forsagnir viðvíkjandi toskastovninum 1990-1991. Vekt í tonsum.

| | 1990 | | Veiðutrýst 1991 | 1991 | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Gýt.stovnur | F(3-7) | Veiða | | G.stovn. | F(3-7) | Veiða |
| 29000 | 0.69 | 25000 | F0.1 | 38000 | 0.17 | 8000 |
| | | | F=F89*0.8 | | 0.56 | 21000 |
| | | | Fmax | | 0.39 | 16000 |
| | | | F=F89 | | 0.69 | 26000 |
| | | | F=F89*1.2 | | 0.83 | 28000 |

**Talva 8.** Hýsuveiðan á føroyska landgrunninum 1980-1989. Veiða í tonsum.

| Land/Ár | 1980 | 1981 | 1982 | 1983 | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 13633 | 10891 | 10319 | 11898 | 11418 | 13597 | 13359 | 13845 | 11687 | 14643 |
| Frakland | 31 | 113 | 2 | 2 | 20 | 23 | 8 | 22 | 14 | |
| V.Týskaland | 4 | | 1 | | | | 1 | 1 | | |
| Noreg | 9 | 20 | 12 | 12 | 10 | 21 | 22 | 13 | 54 | 125 |
| Ongland | 6 | | | | | | | 2 | | |
| Skotland | 434 | 85 | 1 | | | | | | | |
| Danmark | | | | | | | 1 | 8 | 4 | |
| Tilsamans | 14117 | 11109 | 10335 | 11912 | 11448 | 13641 | 13391 | 13891 | 11759 | 14768 |

**Talva 9.** Hýsuveiðan á Føroya Banka 1980-1989. Veiða í tonsum.

| Land/Ár | 1980 | 1981 | 1982 | 1983 | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 690 | 1103 | 1553 | 967 | 925 | 1474 | 1050 | 919 | 469 | 178 |
| Noreg | 8 | 7 | 1 | 2 | 5 | 3 | 10 | 5 | 43 | |
| Ongland | 152 | | | | | | | | | |
| Skotland | 43 | 14 | 48 | 13 | | 25 | 26 | 45 | 15 | 26 |
| Tilsamans | 893 | 1124 | 1602 | 982 | 930 | 1502 | 1086 | 969 | 527 | 204 |

**Talva 10. Hýsuveiðan á landgrunninum 1980-1989 eftir aldri. Tal í túsund.**

| Aldur/Ár | 1980 | 1981 | 1982 | 1983 | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 25 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 2 | 143 | 74 | 539 | 441 | 1195 | 985 | 230 | 283 | 661 | 66 |
| 3 | 58 | 455 | 934 | 1969 | 1561 | 4553 | 2549 | 1715 | 448 | 1584 |
| 4 | 3724 | 202 | 784 | 383 | 2462 | 2196 | 4452 | 3859 | 2485 | 686 |
| 5 | 2583 | 2586 | 298 | 422 | 147 | 1242 | 1522 | 2968 | 3063 | 2908 |
| 6 | 2496 | 1354 | 2182 | 93 | 234 | 169 | 738 | 1112 | 2159 | 2665 |
| 7 | 1568 | 1559 | 973 | 1444 | 42 | 91 | 39 | 528 | 479 | 2061 |
| 8 | 660 | 608 | 1166 | 740 | 861 | 61 | 130 | 83 | 152 | 564 |
| 9 | 99 | 177 | 1283 | 947 | 388 | 503 | 71 | 48 | 18 | 138 |
| 10 | 86 | 36 | 214 | 795 | 968 | 973 | 712 | 334 | 129 | 85 |
| Tilsamans | 11417 | 7051 | 8373 | 7234 | 7883 | 10773 | 10443 | 10930 | 9594 | 10757 |

**Talva 11. Fiskideyðatølini fyri hýsustovnin 1980-1989.**

| Aldur/Ár | 1980 | 1981 | 1982 | 1983 | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 |
| 2 | 0.02 | 0.02 | 0.03 | 0.03 | 0.23 | 0.02 | 0.02 | 0.03 | 0.02 | 0.03 |
| 3 | 0.10 | 0.09 | 0.16 | 0.13 | 0.11 | 0.12 | 0.11 | 0.15 | 0.10 | 0.13 |
| 4 | 0.20 | 0.17 | 0.31 | 0.26 | 0.21 | 0.23 | 0.22 | 0.28 | 0.19 | 0.25 |
| 5 | 0.21 | 0.18 | 0.33 | 0.27 | 0.22 | 0.24 | 0.23 | 0.30 | 0.21 | 0.27 |
| 6 | 0.22 | 0.19 | 0.34 | 0.28 | 0.23 | 0.25 | 0.23 | 0.30 | 0.21 | 0.27 |
| 7 | 0.17 | 0.15 | 0.27 | 0.22 | 0.18 | 0.20 | 0.19 | 0.24 | 0.17 | 0.22 |
| 8 | 0.21 | 0.19 | 0.33 | 0.28 | 0.23 | 0.24 | 0.23 | 0.30 | 0.21 | 0.27 |
| 9 | 0.20 | 0.17 | 0.31 | 0.26 | 0.21 | 0.23 | 0.22 | 0.28 | 0.19 | 0.25 |
| 10 | 0.20 | 0.17 | 0.31 | 0.26 | 0.21 | 0.23 | 0.22 | 0.28 | 0.19 | 0.25 |
| F(4-8) | 0.20 | 0.18 | 0.32 | 0.26 | 0.21 | 0.23 | 0.22 | 0.28 | 0.20 | 0.26 |

**Talva 12. Tal av fiski í hýsustovninum 1. januar 1980-1990 eftir aldri og gýtingarstovnurin í tonsum.**

| Aldur/Ár | 1980 | 1981 | 1982 | 1983 | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 | 1990 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 4652 | 21560 | 25666 | 60365 | 48861 | 30038 | 8183 | 26798 | 3295 | | |
| 2 | 5475 | 3809 | 17652 | 21013 | 49423 | 39982 | 24593 | 6700 | 21940 | 2698 | |
| 3 | 1954 | 4354 | 3051 | 13966 | 16806 | 39385 | 31845 | 19927 | 5230 | 17367 | 2149 |
| 4 | 23638 | 1548 | 3154 | 1660 | 9661 | 12352 | 28142 | 23773 | 14769 | 3878 | 12790 |
| 5 | 12626 | 15999 | 1085 | 1878 | 1015 | 5697 | 8137 | 19032 | 15989 | 9854 | 2557 |
| 6 | 14206 | 8014 | 10771 | 621 | 1158 | 699 | 3548 | 5292 | 12909 | 10335 | 5458 |
| 7 | 9214 | 9384 | 5342 | 6856 | 424 | 738 | 420 | 2241 | 3333 | 8626 | 6067 |
| 8 | 2759 | 6132 | 6280 | 3498 | 4314 | 310 | 522 | 309 | 1360 | 2297 | 5210 |
| 9 | 604 | 1665 | 4473 | 4092 | 2198 | 2758 | 199 | 311 | 178 | 977 | 1374 |
| 10 | 525 | 339 | 746 | 3435 | 5485 | 5334 | 1992 | 2161 | 1277 | 602 | 1091 |
| Tilsamans | 75653 | 72804 | 78220 | 117384 | 139345 | 137293 | 107581 | 106544 | 80280 | | |
| G.stovnur | 84482 | 77319 | 56584 | 58318 | 63372 | 86616 | 90360 | 94325 | 76330 | 68897 | 52636 |

**Talva 13.** Talgrundarlagið undir forsøgnunum viðvíkjandi hýsustovninum.

| Aldur | Stovnur | F | Miðalvekt |
|---|---|---|---|
| 1 | 22000 | 0.00 | 0.359 |
| 2 | 18012 | 0.03 | 0.562 |
| 3 | 2149 | 0.13 | 0.797 |
| 4 | 12790 | 0.25 | 1.008 |
| 5 | 2557 | 0.27 | 1.344 |
| 6 | 5458 | 0.27 | 1.728 |
| 7 | 6067 | 0.22 | 1.965 |
| 8 | 5210 | 0.27 | 2.259 |
| 9 | 1374 | 0.25 | 2.597 |
| 10 | 1091 | 0.25 | 2.914 |

Tilgongd 1990 : 22000
1991 : 22000

Tal í stovni pr. 1/1-1990
Tal uppgivið í túsund
Miðalvekt uppgivin í kg.

**Talva 14.** Forsagnir viðvíkjandi hýsustovninum 1990-1991. Vekt í tonsum.

| 1990 | | | Veiðutrýst 1991 | 1991 | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Gýt.stovnur | F(4-8) | Veiða | | G.stovn. | F(4-8) | Veiða |
| 53000 | 0.26 | 12000 | F0.1 | 56000 | 0.21 | 9000 |
| | | | F=F89*0.8 | | 0.20 | 9000 |
| | | | Fmax | | 0.58 | 21000 |
| | | | F=F89 | | 0.26 | 11000 |
| | | | F=F89*1.2 | | 0.31 | 12000 |

**Talva 15.** Upsaveiðan undir Føroyum 1980-1989. Veiða í tonsum.

| | 1980 | 1981 | 1982 | 1983 | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 23810 | 29682 | 30808 | 38963 | 54344 | 42874 | 40139 | 39212 | 44722 | 44477 |
| Frakland | 1110 | 258 | 130 | 180 | 243 | 839 | 87 | 153 | 313 | 473 |
| V.Týskaland | 197 | 20 | 19 | 28 | 73 | 227 | 105 | 49 | 74 | 22 |
| Noreg | 62 | 134 | 15 | 5 | 5 | | 24 | 14 | 52 | 49 |
| Ongland | 13 | | | | | 4 | | 108 | | 20 |
| Skotland | 38 | 9 | 1 | | | 630 | 1340 | 140 | 92 | |
| Danmark | | | | | | | 21 | 255 | 94 | |
| Ey.Týskaland | | | | | | 31 | | | | 9 |
| Tilsamans | 25230 | 30103 | 30973 | 39176 | 54665 | 44605 | 41716 | 39931 | 45347 | 45050 |

**Talva 16.** Upsaveiðan eftir aldri undir Føroyum 1980-1989.
Tal í túsund.

| Aldur/Ár | 1980 | 1981 | 1982 | 1983 | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 2 | 424 | 0 | 221 | 0 | 0 | 77 | 6 | 10 | 0 | 0 |
| 3 | 996 | 411 | 387 | 2483 | 368 | 1224 | 1167 | 1577 | 867 | 452 |
| 4 | 877 | 1804 | 4076 | 1103 | 11067 | 3990 | 1997 | 5780 | 2654 | 5992 |
| 5 | 720 | 769 | 994 | 5052 | 2359 | 5583 | 4473 | 3818 | 9568 | 5310 |
| 6 | 673 | 932 | 1114 | 1343 | 4093 | 1182 | 3730 | 2779 | 2788 | 7150 |
| 7 | 726 | 908 | 380 | 575 | 875 | 1898 | 953 | 988 | 1302 | 794 |
| 8 | 284 | 734 | 417 | 339 | 273 | 273 | 1077 | 531 | 622 | 547 |
| 9 | 212 | 343 | 296 | 273 | 161 | 103 | 245 | 332 | 363 | 185 |
| 10 | 171 | 192 | 105 | 98 | 52 | 38 | 104 | 81 | 159 | 83 |
| 11 | 196 | 92 | 88 | 98 | 65 | 26 | 67 | 43 | 27 | 55 |
| 12 | 156 | 128 | 56 | 99 | 59 | 72 | 33 | 5 | 43 | 10 |
| 13 | 261 | 176 | 49 | 25 | 18 | 41 | 56 | 11 | 15 | 2 |
| 14 | 133 | 310 | 110 | 127 | 25 | 8 | 7 | 15 | 1 | 11 |
| 15 | 236 | 407 | 687 | 289 | 151 | 154 | 62 | 66 | 1 | 15 |
| Tilsamans | 6065 | 7206 | 8980 | 11904 | 19566 | 14669 | 13977 | 16036 | 18410 | 20606 |

**Talva 17.** Fiskideyðatøl fyri upsastovnin 1980-1989.

| Aldur/Ár | 1980 | 1981 | 1982 | 1983 | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 |
| 2 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 | 0.00 |
| 3 | 0.02 | 0.03 | 0.03 | 0.03 | 0.04 | 0.03 | 0.05 | 0.04 | 0.06 | 0.05 |
| 4 | 0.10 | 0.14 | 0.14 | 0.17 | 0.18 | 0.17 | 0.26 | 0.23 | 0.29 | 0.26 |
| 5 | 0.18 | 0.25 | 0.24 | 0.31 | 0.32 | 0.30 | 0.47 | 0.40 | 0.51 | 0.47 |
| 6 | 0.27 | 0.38 | 0.37 | 0.46 | 0.48 | 0.45 | 0.70 | 0.60 | 0.76 | 0.70 |
| 7 | 0.27 | 0.37 | 0.36 | 0.46 | 0.47 | 0.45 | 0.69 | 0.59 | 0.75 | 0.69 |
| 8 | 0.29 | 0.41 | 0.39 | 0.49 | 0.51 | 0.48 | 0.75 | 0.65 | 0.82 | 0.75 |
| 9 | 0.31 | 0.44 | 0.42 | 0.53 | 0.55 | 0.52 | 0.81 | 0.70 | 0.88 | 0.81 |
| 10 | 0.23 | 0.32 | 0.31 | 0.39 | 0.40 | 0.38 | 0.59 | 0.51 | 0.64 | 0.59 |
| 11 | 0.23 | 0.33 | 0.31 | 0.40 | 0.41 | 0.39 | 0.60 | 0.52 | 0.65 | 0.60 |
| 12 | 0.26 | 0.36 | 0.34 | 0.44 | 0.45 | 0.43 | 0.66 | 0.57 | 0.72 | 0.66 |
| 13 | 0.21 | 0.29 | 0.28 | 0.36 | 0.37 | 0.35 | 0.54 | 0.47 | 0.59 | 0.54 |
| 14 | 0.18 | 0.25 | 0.24 | 0.31 | 0.32 | 0.30 | 0.47 | 0.40 | 0.51 | 0.47 |
| 15 | 0.18 | 0.25 | 0.24 | 0.31 | 0.32 | 0.30 | 0.47 | 0.40 | 0.51 | 0.47 |
| F(4-8) | 0.22 | 0.31 | 0.30 | 0.38 | 0.39 | 0.37 | 0.57 | 0.49 | 0.63 | 0.57 |

**Talva 18.** Tal av fiski í upsaastovninum 1. januar 1980-1990 eftir aldri og gýtingarstovnurin í tonsum. Tal í túsund.

| Aldur/Ár | 1980 | 1981 | 1982 | 1983 | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 | 1990 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 20719 | 60227 | 36243 | 29029 | 65839 | 39907 | 40867 | 14356 | | | |
| 2 | 40752 | 16963 | 49310 | 29673 | 23767 | 53904 | 32764 | 33459 | 11753 | | |
| 3 | 12409 | 32981 | 13888 | 40172 | 24295 | 19459 | 44064 | 26751 | 27394 | 9623 | |
| 4 | 6848 | 9261 | 26632 | 11021 | 30650 | 19558 | 14827 | 39895 | 20479 | 21646 | 7465 |
| 5 | 4262 | 4816 | 5959 | 18134 | 8029 | 15179 | 12424 | 10711 | 27457 | 14106 | 12326 |
| 6 | 3618 | 2841 | 3251 | 3984 | 10310 | 4456 | 7427 | 6420 | 5349 | 13906 | 6734 |
| 7 | 3215 | 2357 | 1491 | 1663 | 2058 | 4779 | 2587 | 2548 | 2772 | 1895 | 4932 |
| 8 | 1537 | 1980 | 1117 | 879 | 846 | 903 | 2214 | 1313 | 1201 | 1107 | 833 |
| 9 | 1017 | 1003 | 963 | 541 | 416 | 448 | 494 | 778 | 600 | 429 | 412 |
| 10 | 648 | 642 | 514 | 523 | 199 | 197 | 274 | 163 | 340 | 169 | 184 |
| 11 | 1030 | 377 | 353 | 326 | 340 | 117 | 127 | 117 | 61 | 137 | 63 |
| 12 | 1121 | 667 | 226 | 210 | 179 | 220 | 72 | 50 | 57 | 26 | 62 |
| 13 | 1963 | 777 | 431 | 135 | 83 | 94 | 116 | 27 | 36 | 9 | 12 |
| 14 | 872 | 1372 | 478 | 308 | 88 | 52 | 40 | 34 | 35 | 16 | 5 |
| 15 | 1546 | 1802 | 2985 | 702 | 530 | 1004 | 355 | 150 | 50 | 24 | 9 |
| Tilsamans | 101557 | 138066 | 143841 | 137300 | 167629 | 160277 | 158652 | 136772 | | | |
| G.stovnur | 118494 | 91279 | 87157 | 103148 | 89280 | 110555 | 89527 | 71973 | 92569 | 77223 | 72667 |

**Talva 19.** Talgrundarlagið undir forsøgnunum viðvíkjandi upsastovninum.

| Aldur | Stovnur | F | Miðalvekt |
|---|---|---|---|
| 1 | 33000 | 0.00 | 0.750 |
| 2 | 26870 | 0.00 | 1.256 |
| 3 | 22000 | 0.05 | 1.473 |
| 4 | 17228 | 0.27 | 1.848 |
| 5 | 12326 | 0.47 | 2.093 |
| 6 | 6734 | 0.70 | 2.831 |
| 7 | 4932 | 0.69 | 3.892 |
| 8 | 833 | 0.75 | 4.712 |
| 9 | 412 | 0.83 | 5.375 |
| 10 | 184 | 0.61 | 6.437 |
| 11 | 63 | 0.64 | 7.107 |
| 12 | 62 | 0.73 | 9.384 |
| 13 | 12 | 0.63 | 9.049 |
| 14 | 5 | 0.47 | 11.682 |
| 15 | 9 | 0.47 | 9.924 |

Tilgongd 1990 : 33000
1991 : 33000

Tal í stovni pr. 1/1-1990
Tal uppgivið í túsund.
Miðalvekt uppgivin í kg.

**Talva 20.** Forsagnir viðvíkjandi upsastovninum 1990-1991. Vekt í tonsum.

| 1990 | | | Veiðutrýst 1991 | 1991 | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Gýt.stovnur | F(4-8) | Veiða | | G.stovn. | F(4-8) | Veiða |
| 73000 | 0.58 | 39000 | F0.1 | 64000 | 0.17 | 12000 |
| | | | F=F89*0.8 | | 0.46 | 30000 |
| | | | F=F89 | | 0.58 | 35000 |
| | | | F=F89*1.2 | | 0.69 | 41000 |

**Talva 21.** Veiðunøgdirnar av stóra kongafiski tilsamans á teimum trimum økjunum gjørdar upp fyri hvørt landi sær.

| Land/Ár | 1980 | 1981 | 1982 | 1983 | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 6000 | 3700 | 2700 | 4500 | 6500 | 8600 | 6000 | 5400 | 5400 | 4800 |
| Ísland | 59600 | 73700 | 96600 | 85600 | 83800 | 66700 | 67100 | 68500 | 79800 | 57600 |
| V.Týskaland | 22100 | 23700 | 23800 | 15900 | 5900 | 1700 | 1600 | 700 | 800 | 400 |
| Frakland | | | 100 | 300 | 400 | 900 | 600 | 500 | | |
| Grønland | | | | | | 100 | 1900 | 400 | 3200 | 300 |
| Belgia | 1400 | 900 | 300 | 400 | 300 | 400 | 400 | 400 | 400 | 200 |
| Tilsamans | 89100 | 102000 | 123500 | 106700 | 96900 | 78400 | 77600 | 75900 | 89600 | 63300 |

**Talva 22.** Veiðunøgdirnar av trantkongafiski tilsamans á teimum trimum økjunum gjørdar upp fyri hvørt landi sær.

| Land/Ár | 1980 | 1981 | 1982 | 1983 | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 600 | 700 | 2300 | 1600 | 3000 | 4300 | 9700 | 9200 | 8300 | 8600 |
| Ísland | 10200 | 19700 | 18500 | 37100 | 24500 | 24800 | 18900 | 19300 | 14200 | 31200 |
| V.Týskaland | 14300 | 23300 | 24500 | 19500 | 13600 | 9900 | 9500 | 6400 | 6500 | 3200 |
| Frakland | 600 | | 100 | 100 | 100 | 300 | 200 | 100 | 1000 | 600 |
| Grønland | | | | | | 4500 | 7700 | 2500 | 600 | |
| Sovjett | | | | | 100 | 900 | 300 | 100 | | |
| Tilsamans | 25700 | 43700 | 45400 | 58300 | 41300 | 44700 | 46300 | 37600 | 30600 | 43600 |

**Talva 23.** Veiðunøgdirnar av uppsjóartrantkongafiski í Irmingerhavinum.

| Land/Ár | 1980 | 1981 | 1982 | 1983 | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bulgaria | | | | | 2961 | 5825 | 11385 | 12270 | 8455 | 4546 |
| Føroyar | | | | | | | | | 1090 | |
| Ey.Týskaland | | | | 155 | 989 | 5438 | 8574 | 7023 | 16480 | 6796 |
| Ísland | | | | | | | | | | 2722 |
| Japan | | | | | | | | | | 307 |
| Pólland | | | 581 | | 239 | 135 | 149 | 25 | | 112 |
| Sovjett | | | 59914 | 60079 | 60643 | 60273 | 84994 | 71469 | 65026 | 22700 |
| Tilsamans | | | 60495 | 60234 | 64832 | 71671 | 105102 | 90787 | 91051 | 37183 |

**Talva 24.** Blálonguveiðan undir Føroyum 1980-1989. Veiða í tonsum.

| Land/Ár | 1980 | 1981 | 1982 | 1983 | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 1223 | 1529 | 2889 | 4396 | 7210 | 4434 | 4880 | 3069 | 6351 | 4048 |
| Frakland | 2427 | 371 | 843 | 668 | 515 | 1193 | 2578 | 3246 | 3036 | 1671 |
| V.Týskaland | 5905 | 2867 | 2538 | 223 | 223 | 217 | 197 | 142 | 49 | 51 |
| Noreg | 463 | 260 | 187 | 438 | 155 | 210 | 126 | 171 | 166 | 322 |
| Tilsamans | 10018 | 5027 | 6457 | 5725 | 8103 | 6054 | 7781 | 6628 | 9602 | 6092 |

**Talva 25.** Longuveiðan undir Føroyum 1980-1989. Veiða í tonsum.

| Land/Ár | 1980 | 1981 | 1982 | 1983 | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 1821 | 2370 | 2505 | 2821 | 3190 | 2583 | 2941 | 2220 | 2033 | 4800 |
| Frakland | 49 | 13 | 16 | 155 | 11 | 40 | 123 | 384 | 53 | |
| V.Týskaland | 12 | 1 | 3 | 5 | 6 | 3 | 6 | 8 | 4 | |
| Noreg | 2411 | 2776 | 3614 | 2746 | 1566 | 1955 | 2240 | 1999 | 2168 | 2742 |
| Ongland | 1 | | | | | | | 1 | 1 | |
| Skotland | 211 | 28 | 94 | 48 | 4 | 2 | 1 | 1 | 5 | |
| Danmark | | | | | | | 4 | 16 | 4 | |
| Tilsamans | 4505 | 5188 | 6232 | 5775 | 4777 | 4583 | 5315 | 4629 | 4268 | 7542 |

**Talva 26.** Brosmuveiðan undir Føroyum 1980-1989. Veiða í tonsum.

| Land/Ár | 1980 | 1981 | 1982 | 1983 | 1984 | 1985 | 1986 | 1987 | 1988 | 1989 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 4717 | 2066 | 4148 | 3450 | 4355 | 5288 | 3625 | 4182 | 3454 | 3142 |
| Frakland | 24 | 14 | 14 | 15 | 25 | 34 | 24 | 54 | 81 | |
| V.Týskaland | 23 | 7 | 12 | 11 | 16 | 10 | 15 | 13 | 8 | |
| Noreg | 2688 | 2748 | 2092 | 1935 | 1537 | 1975 | 1556 | 2198 | 2204 | 3064 |
| Skotland | 358 | 15 | 125 | 73 | 2 | | | | | |
| Danmark | | | | | | | | 2 | | |
| Tilsamans | 7810 | 4850 | 6391 | 5484 | 5935 | 7307 | 5220 | 6449 | 5747 | 6206 |



Toskastovnurin a landgrunninum
Heildarveida sidani 1962
Veida, tus. tons
40
35
30
25
20
15
1960
1965
1970
1975
1980
1985
1990
Ar


Mynd 1.



Toskastovnurin a Foroya Banka
Heildarveida sidani 1965
Veida i tonsum
6000
5000
4000
3000
2000
1000
0
1960
1965
1970
1975
1980
1985
1990
Ar


Mynd 2.



Toskaveidan a landgrunninum 1989
Veida, tus. tons
Opn.batar
Utr.batar
Trolb.
Snelluv.
Garnav.
Stall.skip
Ei.trol<1000
Ei.trol>1000
P.trol<1000
P.trol>1000
Okent


Mynd 3.



Toskastovnurin a landgrunninum
Veidutryst
Fiskideydatal
Ar


Mynd 4.


Toskastovnurin a landgrunninum
Gytingarstovnur og tilgongd sidani 1962
Gytingarstovnur, tus. tons
Tilgongd sum 1 ar, tal i millionum
0
40
80
120
160
0
20
40
60
80
1960
1965
1970
1975
1980
1985
1990
Ar
G.stovnur
Tilgongd

Mynd 5.


Hysustovnurin
Heildarveida sidani 1962
Veida, tus. tons
0
5
10
15
20
25
30
1960
1965
1970
1975
1980
1985
1990
Ar

Mynd 6.



Hysustovnurin a Foroya Banka
Heildarveida sidani 1965
Veida i tonsum
3500
3000
2500
2000
1500
1000
500
0
1960
1965
1970
1975
1980
1985
1990
Ar


Mynd 7.



Hysuveidan a landgrunninum 1989
Veida i tus. tonsum
8
7
6
5
4
3
2
1
0
Opn.batar
Utr.batar
Trolb.
Snelluv.
Garnav.
Stall.skip
El.trol<1000
El.trol>1000
P.trol<1000
P.trol>1000
Okent


Mynd 8.




Mynd 9.




Mynd 10.




Mynd 11.




Mynd 12.




Mynd 13.




Mynd 14.




Mynd 15.




Mynd 16.




Mynd 17.




Mynd 18.


Veida av brosmu eftir oki
Veida, tus. tons
10
8
6
4
2
0
1980
1981
1982
1983
1984
1985
1986
1987
1988
1989
Ar
Foroyar
Island
Ey.Gronland
V.f. Hebrid.

# Mynd 19.

# Yvirlit yvir útkomin smárit frá Fiskirannsóknarstovuni.

Smáritini frá Fiskirannsóknarstovuni eru ætlað fyri part til innanhýsis nýtslu á stovninum at lýsa fyribils úrslit, sum ikki eru nóg fullfíggjað ella hava nóg miklan almennan áhuga til at koma í ritið: *Fiskirannsóknir*, og fyri part verða tey nýtt til at skjalprógva álit til myndugleikar ella smærri skrivlig avrik.

Í flestu førum verða smáritini send bløðunum til kunningar, og Landsbókasavnið fær tvítak av øllum ritum. Tey verða tó bert prentað í heilt fáum eintøkum, og Fiskirannsóknarstovan hevur vanliga ikki eintøk at láta einstaklingum ella stovnum. Loyvt er at margfalda og nýta innihaldið í ritunum.

## Smárit 1989:

89/1 : Stovnsmetingar 1989

89/2 : Migrations of cetaceans and seals in the Northeast Atlantic in relation to hydrography (Samandráttur á enskum frá fundi, hildin í Norðurlandahúsinum 29/8-3/9 1988).

89/3 : Hummaraveiðan. *Árni Nicolajsen.*

89/4 : Hvussu nógv tola fiskastovnarnir. *Hjalti í Jákupsstovu.*

89/5 : Fiskaalingin í Føroyum fyrst í 90-árunum, alistøðir og framleiðsla. *Andrias Reinert.*

89/6 : Trolingin á landleiðini. *Rógvi Mouritsen og Hjalti í Jákupsstovu.*

89/7 : Algukanningar, 1989. *Eilif Gaard og Karina Nattestad.*

89/8 : Kanningar við Magnusi Heinasyni 1989.

## Smárit 1990:

90/1 : Royndir við flatfiskagørnum. *Rógvi Mouritsen.*

90/2 : Stovnsmetingar 1990. *Andras Kristiansen.*